



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og stundum regn, men seinnapartin andøvsgul av norði og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið hósdagin, fríggjadagin og leygardagin:**
Fleyr til gul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Mentamálaráðharrin innlagdur á deild 8

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, hevur ligið á deild 8 á landssjúkrahúsinum hetta vikuskiftið. Illgruni er um ov høgt blóðtrýst. Tórbjørn Jacobsen luttók í einum tiltaki í Æðuvík, í samband við at bygdin er vorðin kosin reinasta bygd í Føroyum. Í hesum sambandi kapprann hann við Sámal Petur í Grund, landsstýrismann. Teir høvdu hvør sína trillubøru við eini kvinnu sum førningi og síðan skuldu teir renna ein tein. Sámal Petur í Grund hevði betri tak á trillubøruni við kvinnuni sum førningi og vann. Eftir kappingina kendi Tórbjørn seg illa og varð seinni fluttur á landsjúkrahúsið.

Í gjár var Tórbjørn ikki útskrivaður og skrivarin hjá honum vísti okkum til deild átta. Men allan fyrrapartin og heilt fram til okkara evsta mark varð landsstýrismaðurin til kanningar og tí fingu vit ikki hansara egnu orð fyri hvussu støðan var. Heilt ring er hon tó ikki, tí landsstýrismaðurin fekk sunnudagin frí til at fara í Norðurlandahúsið í samband við at Kasparov leikaði har. Og Tórbjørn var eisini at hoyra í útvarpinum beint eftir.

Tórbjørn Jacobsen leggur frá sær sum landsstýrismaður komandi hósdag. Um innleggingin á landssjúkrahúsinum fer at broyta hetta vita vit ikki enn.

*Stríggið hevur verið hjá Tórbirni í seinastuni – og hósdagin leggur hann frá sær*



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 11 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 13 |
| | 18 |

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/06 kl. 06[00]–11/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í juni 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 10/06 kl. 06[00]–11/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 14,4 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

6. juni: Fullmáni
11. juni: Mánin longst frá jørðini
14. juni: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna— sundi fp. | sp. | Mykines— firði fp. | sp. | Nólsoyar— firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna— sundi fp. | sp. | Fugloyar— firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. juni | 00.03 | 12.22 | 11.22 | 23.40 | 11.37 | 23.55 | 02.03 | 14.22 | 03.03 | 15.22 | 10.37 | 22.55 | 09.37 | 21.55 | 00.18 | 12.37 | 01.18 | 13.37 | — | 12.07 | 01.03 | 13.22 |
| 13. juni | 00.40 | 12.59 | 11.59 | — | — | 12.14 | 02.40 | 14.59 | 03.40 | 15.59 | 11.14 | 23.46 | 10.14 | 22.46 | 00.55 | 13.14 | 01.55 | 14.14 | 00.25 | 12.44 | 01.40 | 13.59 |
| 14. juni | 01.31 | 14.04 | 00.31 | 13.04 | 00.46 | 13.19 | 03.31 | 16.04 | 04.31 | 17.04 | — | 12.19 | 11.19 | 23.51 | 01.46 | 14.19 | 02.46 | 15.19 | 01.16 | 13.49 | 02.31 | 15.04 |
| 15. juni | 02.36 | 15.08 | 01.36 | 14.08 | 01.51 | 14.23 | 04.36 | 17.08 | 05.36 | 18.08 | 00.51 | 13.23 | — | 12.23 | 02.51 | 15.23 | 03.51 | 16.23 | 02.21 | 14.53 | 03.36 | 16.08 |


Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið



Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

www.sosialurin.fo

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,-
og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544